# SKÚLAFÓTBÓLTUR

Góðu næmingar og foreldur,

nú nærkast dagurin, har vit fara til Vágs, í Marghøllina at kappast í 1. umfarinum í Skúlafótbólti, sum verður fyri 4. flokkar mikudagin 31. oktober.

Tað eru tilmeldaði 17 lið í 4. flokki. Tilsamans eru tað umleið 125 næmingar. Á heimasíðuni www.skulafotboltur.fo, undir "Kappingar & úrslit" og 4. flokkur (beinleiðis leinkja er her: http://skulafotboltur.fo/kappingar-urslit/4-flokkur/) síggja tit, hvørji lið eru tilmeldaði.

SvL hevur meldað 6 lið úr 4. flokki til kappingina. 3 dreingjalið, 2 gentulið og 1 blandað lið.

**Ferðaætlanin:**

Næmingarnir møta í seinasta lagi kl. 8:15 uttanfyri Farstøðina. Vit eru á Krambatanga á Tvøroyri kl. 10.30. Bussar við átekningini "Skúlafótbóltur" bíða á keiini eftir okkum. Hesir bussar koyra beinleiðis til Marghøllina – og eru vit í Marghøllini umleið kl. 11.00. Bussarnir koyra eisini úr Marghøllini kl. 17.30 og á Krambatanga. Smyril er aftur í Havn kl. 20:30.

**Kostur:**

"Uden mad og drikke, duer helten ikke!" er eitt gamalt orðatak. Av tí at dagurin verður heldur drúgvur, hevur skúlin bílagt døgurða til næmingarnar í Vági. Tó vilja vit mæla til, at øll hava etið nógvan morgunmat og hartil taka ein stóran matpakka við (t.d. breyð + frukt). Minnist eisini til at hava drekkidunk við. Lummapeningur er loyvdur, tó í mesta lagi umleið kr. 120,-.

**Minnist til:**

Minnist til ítróttarklæði, drekkidunk, fótbóltsskógvar og skinnarar (hetta er eitt krav!). Minnist eisini til at taka svimjiklæðir + handklæði við, tí møguleiki verður at fara at svimja í Páls Høll (ókeypis fyri luttakandi liðini), áðrenn vit fara heimaftur. Vit fara at brúka tær vøkru lilla-litaðu SvL-troyggjurnar, ið 4. flokkur var ílatin á felagsskúlamyndini í juni mánaði í ár. Vinarliga takið tær við suður.

Eru ivamál ella spurningar, so kunnu tit altíð senda ferðaleiðaranum ein teldupost (roi.jacobsen@skulin.fo) ella ringja (til Róa Jacobsen 280313).

Blíðar heilsanir

Skúlin við Løgmannabreyt